# Vestmanna dagar 2026



VESTMANNA KOMMUNA

# Vælkomin á Vestmannadagar!

## NÚ FARA VIT AFTUR AT SETA OKKARA BYGD OG RÍKA FELAGSSKAP Í MIÐDEPILIN Í NAKRAR DAGAR



Kommunan bjóðar øllum borgarum hjartaliga vælkomnum til eina fjølbroytta viku við ymiskum tiltøkum, har høvið er at hittast, vera saman og hugna sær, samstundis sum vit varpa ljós á nakað av tí rúgvismikla, sum Vestmanna hevur at bjóða.

Vestmannadagar eru føst siðvenja hvørt ár fyrstu vikuna í september, og hetta er trettandu ferð, at dagarnir verða fyriskipaðir. Skráin er sum altíð á tremur við tiltøkum, og vit hava lagt okkum eftir at hava nakað til øll. Okkurt er afturvendandi, meðan onnur tiltøk eru nýggj.

Ein bygd er so nógv meira enn hús, vegir og bygningar. Hon er fyrst og fremst fólkini, felagsskapirnir, mentanin, vinnan, frítíðarvirksemið, og mongu eldsálirnar, sum hvønn dag skapa eitt livandi og gott stað at liva og virka í. Tað er hetta, sum vit vilja vísa fram og fegnast um hesar dagarnar.

Tað er umráðandi at minnast og hátíðarhalda alt tað, sum vit eiga, og alt tað, sum vit eru í Vestmanna.

Hjartaliga vælkomin á Vestmannadagar.

**Sára Jógvansdóttir,**
*borgarstjóri*



# Mikudagur 2. september

**Kl. 16.00 - 21.00** — **VEKTARBÚÐIN**

**KAFE LETUR UPP**
*Kom á hugnaligu kafeina í Vektarbúðini, sum Essan hevur á Vestmannadøgunum. Tær selja smyrjibreyð, góðar køkur, kaffi oa.*

**Kl. 17.30** — **TORGIÐ**

**VESTMANNADAGAR VERÐA SETTIR**
*Anja Haldansen, forkvinna í trivnaðarnevndini í Vestmanna kommunu setir Vestmannadagarnar og Bjarki Virgarsson syngur nakrar sangir.*

**Kl. 17.45** — **TORGIÐ**

**RENN Í LITUM**
*Lat teg í tíni litríku ella hvítu klæðir, so tú sært út sum ein litpalett, tá ið renningin er av. Renn, gang, trilla ella tað, sum tú hevur hug til. Byrjað verður við Torgið, síðan verður farið fram við kirkjuni og út til Grønanesheimið og heimaftur eftir keiini. Endað verður við Fiskastykkið, omanfyri Johnsa handil.*

**Kl. 18.00 - 21.00** — **SPÆLHÚSIÐ**

**FERNISERING**
*Ingrid Møller letur upp listaframsýning í Spælhúsinum undir heitinum "Lý". Eisini verður sangframførsla.*



**Kl. 18.00 - 22.00** — **STAÐIÐ**

**BORÐSPØL**
*Kom og spæl borðspøl! Borðspælsáhugafelagið TableTop Føroyar verður á loftinum á Staðnum við teirra vælumtókta borðspælskvøldi. Støkk inn og spæl eitt spæl ella fleiri. Tiltakið er fyri allar aldursbólkar.*

**Kl. 19.00 - 21.00** — **VEKTARBÚÐIN**

**FYRILESTUR OG TÓNLEIKUR**
*Jóan Pauli Joensen, fólkalívsfrøðingur, fer at greiða frá um tíðina í 50- og 60 árunum í Vestmanna, tá Vektarbúðin og Handilin hjá John vóru ein týðandi partur av virkseminum í bygdini. Síðan fer Kartin L. Hansen at greiða frá føroysku rokksøguni og hvønn leiklut Vestmanna hevði. Eftir tað fara Ólavur Højgaard, Hallgrím Miðberg og Niels Olsen, ið allir eiga sín stóra lut í føroysku rokksøguni, at syngja og spæla nakrar sangir.*

# Hósdagur 3. september

| | | |
|---|---|---|
| **Kl. 09.30** | **DAGSTOVNAØKIÐ** | **BAMSURENNING**<br>*Barnabati og dagstovnaøkið í Vestmanna kommunu skipa fyri bamsurenning fyri børnunum á dagstovnaøkinum. Bamsurenningin varpar ljós á Betri vinir, ið er ein fyribyrgjandi verkætlan móti happing.* |
| **Kl. 15.00 - 17.00** | **SPÆLIPLÁSSIÐ VIÐ LÁTIPÍPUNA** | **GRILL FYRI ØLL**<br>*Børn, tilkomin og eldri verða boðin til hugna og grillaðar pylsur við øllum tilhoyri á spæliplássinum við útibarnagarðin. Inngongd er bæði frá Heygalíð og Dalalíð.* |
| **Kl. 15.00 - 19.00** | **ELVA LEIR** | **MÁLA LEIR**<br>*Elva leir, ið heldur til í gamla posthúsinum á Heygum, bjóðar til eina hugnaliga og kreativa løtu við leiri. Bílegg tíð á 216490 ella á sosialu miðlunum hjá Elva leir. Øll, sum eru 16 ár og yngri, mála fyri hálvan prís.* |
| **Kl. 17.00 - 21.00** | **VEKTARBÚÐIN** | **KAFE**<br>*Hugnaliga kafein í Vektarbúðini selur smyrjibreyð, góðar køkur, kaffi oa.* |
| **Kl. 17.00 - 21.00** | **JOHNSA HANDIL** | **SØLUBÚÐ**<br>*Rebekka Joensen, ið arbeiðir undir heitinum Linjurebekka, selur sína myndlist, Bakstur til keyps selur ymiskt gott at taka heim við og Ann-Mari Egholm selur grafiskar myndir.* |
| **Kl. 18.00 - 21.00** | **SPÆLHÚSIÐ** | **LISTAFRAMSÝNING**<br>*Listaframsýning við Ingrid Møller í Spælhúsinum.* |
| **Kl. 18.00** | **STAÐIÐ** | **SJAVSKAPPING**<br>*Sjavskapping í veghæddini á Staðnum. Vinningar verða latnir til nrummar 1, 2, og 3.* |



| | | |
|---|---|---|
| **Kl. 20.00 - 21.00** | **SPÆLHÚSIÐ** | **KONSERT VIÐ LENU OG NICLAS**<br>*Lena Andersen er ein av mest virknu tónleikarum í Føroyum. Hon hevur skrivað tónleik, givið út og spælir eina ørgrynnu av konsertum hvørt ár, bæði her heima og uttanlands. Hetta kvøldið framførir hon saman við manni sínum og gittarsnillinginum, Niclasi Johannesen í hugnaliga Spælhúsinum á bedingini.* |

# Fríggjadagur 4. september

| | | |
|---|---|---|
| **Kl. 07.00 - 11.00** | **MAGN** | **MAGN BJÓÐAR KAFFI, WIENARBREYÐ OG SUNKIST**<br>*Magn støðin hevur opið millum klokkan 07.00 og 23.00.* |
| **Kl. 09.00 - 17.00** | **FJØRUKRÓGVIN** | **FJØRUKRÓGVIN BJÓÐAR Á SPENNANDI FERÐ**<br>*Vitja livandi og flotta søgusavnið við voksfigurum úr Føroya søgu ella royn "virtual reality" brillur og gang í skorini og sý í bjørgunum.* |
| **Kl. 11.00 - 16.00** | **Á-HANDILIN** | **Á-HANDILIN BJÓÐAR KAFFI OG OKKURT SØTT**<br>*Á-handilin hevur opið millum kl. 09.00 og 22.00.* |
| **Kl. 14.30 - 17.00** | **MIÐNÁM** | **KAFE**<br>*2. flokkur á Miðnámi bjóðar á kafe, har søla verður av køkum, kaffi v.m.* |
| **Kl. 15.00 - 16.00** | **GRØNANESHEIMIÐ** | **HUGNALØTA VIÐ SANGI**<br>*Hugnaløta verður á heiminum á Grønanesi, har Jógvan Elias og Tummas Heri spæla góðan og lívligan tónleik.* |
| **Kl. 15.00 - 19.00** | **ELVA LEIR** | **MÁLA LEIR**<br>*Elva leir, ið heldur til í gamla posthúsinum á Heygum, bjóðar til eina hugnaliga og kreativa løtu við leiri. Bílegg tíð á 216490 ella á sosialu miðlunum hjá Elva leir. Øll, sum eru 16 ár og yngri, mála fyri hálvan prís.* |
| **Kl. 15.00** | **MIÐNÁM** | **BARNABIOGRAFUR**<br>*Biografur fyri børn verður í fyrilestrarsalinum í Miðnámi. Kostnaður 50 krónur. Eisini verður poppkorn, sunkist o.a. til keyps.* |
| **Kl. 16.00** | **KVÍVÍK** | **STUÐULSRENNING HJÁ VÍF**<br>*Gang ella renn. Tak vinir, familju, bindiklubban, starvsfelagar ella liðfelagar við, og ger dagin til eina góða felags uppliving. Byrjað verður við vendiplássið omanfyri Kvívík og endað verður uttanfyri Vestpack.* |
| **Kl. 16.00 - 18.00** | **SEV** | **GRØN ORKA, HOPPIBORG OG POPPKORN**<br>*Rundvísing verður á Fossáverkinum og á koblingarstøðini. Ítrivsborð verða sett fram til børnini, har tey m.a. kunnu gera sær eina vindmyllu. Ábit og ymiskt søtt og salt verður til góman.* |
| **Kl. 17.00** | **SEV** | **KONSERT VIÐ BRIM**<br>*Lokali tónleikabólkurin, Brim, spælir í goymsluni hjá SEV.* |
| **Kl. 17.00 - 19.00** | **VESTPACK** | **ÍSUR OG ANNAÐ GOTT**<br>*Vestpack bjóðar á gátt aftur í ár, har ísur, ymsar drekkivørur og annað gott verður at fáa. Um veðrið verður til vildar, verða hoppiborgir settar fram. Møguleiki verður at fylgja við stuðulsrenningini hjá VÍF og taka ímóti, tá tey koma á mál.* |
| **Kl. 16.00 - 20.00** | **MILLUM Á OG VESTPACK** | **MATMARKNAÐUR**<br>*Tríggir matvognar selja ymsan nátturðamat.* |
| **Kl. 18.00 - 21.00** | **SPÆLHÚSIÐ** | **LISTAFRAMSÝNING**<br>*Listaframsýning við Ingrid Møller í Spælhúsinum.* |



| | | |
|---|---|---|
| **Kl. 20.00 - 21.00** | **FAER ISLES DISTILLERY** | **KONSERT VIÐ MARIUS**<br>*Marius Ziska hevur verið eitt av føroya fremstu tónleikanøvnum í mong ár. Við síni vøkru rødd og góðu sangum og orðum, fer hann við bólki at framføra í bryggjarínum. Atgongumerki kosta 100 krónur og kunnu keypast á atgongumerki.fo. Plássið er avmarkað.* |
| **Kl. 21.00 - 01.00** | **STAÐIÐ** | **KAREOKEKVØLD**<br>*Undómshúsið Staðið hevur opið fyri ungdóminum. Kareokemaskinan verður tendrað og pallurin er tín, um tú hevur hug at syngja ella kanska siga eina góða.* |
| **Kl. 22.00 - 00.00** | **DISVOY** | **SPURNARKAPPING**<br>*Kom og royn tína vitan. Disvoy skipar fyri spurnarkapping. Køkurin er opin frá klokkan 17.00 til 22.000. Eftir tað hevur bara barrin opið.* |

# Leygardagur 5. september

| | | |
|---|---|---|
| **Kl. 9.30 - 11.00** | **ÍTRÓTTAHØLLIN** | **MORGUNMATUR Í HØLLINI**<br>*Allir vestmenningar verða bodnir til felags morgunmat í høllini. Á skránni verður eisini sangur og ársins herðaklapp verður handað.* |
| **Kl. 12.30 - 15.30** | **ÍTRÓTTAHØLLIN** | **SØLUMARKNAÐUR**<br>*Sel leikur ella klæðir, ið tú ikki brúkar meira ella sel heimavirkaðar vørur v.m. Tilmelding til søluborð fer fram við at senda boð til Anju Haldansen á 522553 ella á Messenger. GG! Avmarkað pláss.* |
| **Kl. 12.30 - 15.30** | **ÍTRÓTTAHØLLIN** | **KAFFI OG KAKUSØLA**<br>*8. flokkur selur ymiskt gott til børn og vaksin.* |
| **Kl. 12.30 - 15.30** | **ÍTRÓTTAHØLLIN** | **FÁ HOL Í OYRUNI**<br>*Michelle skjýtur hol í oyru. Kostnaður fyri eitt oyra er 149 krónur og bæði 249 krónur.* |
| **Kl. 12.30 - 15.30** | **ÍTRÓTTAHØLLIN** | **FLÆTTUR Í HÁRIÐ**<br>*Fá vakrar flættur, kular halar, litir, glimmur v.m. í hárið. Ymiskt verður at velja í hjá bæði gentum og dreingjum. Kostnaður millum 10 og 50 krónur.* |

| | | |
|---|---|---|
| **Kl. 12.30 - 15.30** | **ÍTRÓTTAHØLLIN** | **TEKNIBORÐ**<br>*Borð eru frammi, har børn kunnu royna síni listarligu evni við pappíri og litum. MB skipar fyri.* |
| **Kl. 14.00 - 15.00** | **BEDINGIN** | **FLETTING**<br>*Kom oman á bedingina og hygg, tá ið kálvar verða flettir.*<br>*Tað verður eisini møguleiki at keypa frískt tarvakjøt við sær heim.* |
| **Kl. 15.00 - 21.00** | **BAKKAVEGUR** | **STØKKUPPHANDIL**<br>*Klædnahandilin, Sorella, selur klæðir og tilhoyr, bæði til ungu og til tilkomnu kvinnuna í gamla skóhandlinum hjá Nicolinu.* |
| **Kl. 15.00 - 22.00** | **VEKTARBÚÐIN** | **KAFE**<br>*Hugnaliga kafein í Vektarbúðini selir smyrjibreyð, góðar køkur, kaffi o.a.* |



| | | |
|---|---|---|
| **Kl. 15.00 - 22.00** | **JOHNSA HANDIL** | **SØLUBÚÐ**<br>*Linjurebekka selur myndlist, Kristina Chrisoffersen selur heimagjørdar smúkkur og Smilo.com selur hondgjørdar smiðjulutir til frítíð og ítriv.* |
| **Kl. 15.00 - 04.00** | **DISVOY** | **MATUR OG BARR**<br>*Køkurin er opin frá kl. 15.00 til 22.00. Barrin verður opin til út á náttina.* |
| **Kl. 15.30 - 16.00** | **BAKKAVEGUR** | **GULI HÁLVMÁNI OG MOTORSÚKKLUR**<br>*Motorsúkklubólkurin, Guli hálvmáni, verður á Bakkavegi við sínum motorsúkklum.* |
| **Kl. 15.30 - 18.30** | **BAKKAVEGUR** | **MILKSHAKES, SLUSHICE OG POPPKORN**<br>*Leynningar selja ymiskt gott, m.a. tann kenda og vælsmakkandi "milkshakein", ið fyrr fekst hjá Kiosk Aktiv.* |
| **Kl. 16.00 - 17.30** | **BAKKAVEGUR** | **BARNATILTAK OG KONSERT**<br>*Ásbørn Berthelsen undirheldur við gykli og eisini fara børn úr Vestmanna at syngja og framføra.* |

**Kl. 16.00 - 20.00** **SPÆLHÚSIÐ**

**LISTAFRAMSÝNING**
*Listaframsýning við Ingrid Møller í Spælhúsinum.*



**Kl. 17.30** **GAMLA KEI**

**FISKIKAPPING FYRI BØRN**
*Fiskikapping verður fyri børn á keiini niðan fyri fiskavirkið. Tann, ið fær tyngsta fiskin, vinnur. Vinningar verða latnir til nr. 1, 2 og 3. Heitt verður á foreldur og avvarðandi um at lata børnini í bjargingarvest.*

**Kl. 19.00 - 19.30** **BAKKAVEGUR**

**GRILLAÐUR LAKSUR**
*Øll eru vælkomin at royna grillaðan laks frá Hiddenfjord. Manningin í Brim grillar og Gundur ger sítt vælumtókta eplamorl. Býtt verður út til uppi er.*

**Kl. 19.30 - 20.00** **BAKKAVEGUR**

**FØROYSKUR DANSUR**
*Komið og sláið ring saman við Norðstreymoyar Dansifelag.*

**Kl. 20.00** **BAKKAVEGUR**

**SYNGIÐ VIÐ**
*Rógvutrio fer at syngja fyri undir felagssangi, saman við góðum tónleikarum úr bygdini. Sangheftið kann heintast á vestmanna.fo.*




**Kl. 21.00** **BAKKAVEGUR**

**ABBA-SHOW**

*Dancing Queen, Mama Mia og onnur hitt fara at runga, tá ið tey fýra, Edith, Ann Chanett, Allan og Bjarni fara at taka okkum aftur í tíð og inn í serkenda heimin hjá ABBA, bæði við sangi, dansi og stíli.*

**Kl. 22.00** **BAKKAVEGUR**

**KONSERT VIÐ SAKARIS**

*Tað er altíð futtur í og gott undirhald, tá ið Sakaris trínur á pall í sínum litføgru klæðum, serligu dansitrinum og fangandi sangum. Hetta kvøldið verður tað á Bakkavegi við fullari manning.*




**Kl. 23.00** **BAKKAVEGUR**

**KONSERT VIÐ ANNFINNI OG CO.**

*Tað verða Anfinn & Co, sum fara at seta punktum á stóra pallinum, tá teir fara at rokka og syngja hittini um húkin, Tinganes, politikk, Føroyar og kærleika.*

**Kl. 00.00 - 03.30** **BAKKAVEGUR**

**TÓNLEIKUR Í TJALDINUM**

*Góður livandi tónleikur verður í tjaldinum á Bakkavegi, har Ólavur á Váli og John Johansen fara at syngja og spæla. Eisini verður møguleiki at dansa.*

# Sunnudagur 6. september



| | | |
|---|---|---|
| **Kl. 11.00** | **VIÐARLUNDIN** | **ÚTIGUÐSTÆNASTA**<br>*Útiguðstænasta verður í ovala økinum í viðarlundini við Anniku Magnussen Gaard, presti.* |
| **Kl. 12.00 - 16.00** | **VEKTARBÚÐIN** | **KAFE**<br>*Hugnaliga kafein í Vektarbúðini selur sunnudagsdøgurða, langtíðarstokt lamskjøt við tilhoyri, umframt kaffi og ymiskt søtt.* |
| **Kl. 12.00 - 16.00** | **JOHNSA HANDIL** | **SØLUBÚÐ**<br>*Eira Silvur selur heimagjørdar smúkkur, Bakstur til keyps selur ymiskt gott at taka heim við og Labbin.fo selur alt til hundin.* |
| **Kl. 14.00** | **ÍTRÓTTAHØLLIN** | **SÚKKLUTÚRUR NORÐUR Á FOSSARNAR**<br>*Skipað verður fyri felags súkklutúri norður á Fossarnar. Møtið við ítróttahøllina. Jan Nielsen skipar fyri.* |
| **Kl. 15.00 - 18.00** | **SPÆLHÚSIÐ** | **LISTAFRAMSÝNING**<br>*Listaframsýning við Ingrid Møller í Spælhúsinum.* |
| **Kl. 16.00 - 18.00** | **MISSIÓNSHÚSIÐ** | **OPIÐ HÚS, KAFFI OG SANGUR** |